HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Kristin Michelsen, borgarstjóri
Tvøroyrar kommuna
Tvørávegur 37
800 Tvøroyri

Dato: 13. desember 2018
Mál: -/18/01072-3
Tygara skriv:
Viðgjørt:

**Til borgarstjóran á Tvøroyri, Kristin Michelsen**

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur tann 3. desember 2018 móttikið kæru um gegni hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum í sambandi við málið um rættin hjá borgarstjóranum at vera løgtingslimur og borgarstjóri samstundis.

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur viðgjørt málið. Hetta ítøkiliga málið snýr seg um rættin hjá kommunustýrislimum at fáa mál á skrá, sí viðhefta skriv, dagfest 9. oktober 2018. Ítøkiliga málið snýr seg sostatt ikki um rættin hjá borgarstjóranum at vera løgtingsmaður og borgarstjóri samstundis.

Mett verður ikki, at Heilsu- og innlendismálaráðið er ógegnigt at viðgera spurningin um rættin hjá kommunustýrislimum at fáa mál á skrá.

Spurningurin um, hvørt Heilsu- og innlendismálaráðið er ógegnigt at viðgera eitt møguligt komandi eftirlitsmál um eina møguliga komandi býráðssamtykt um rættin hjá borgarstjóranum at vera løgtingslimur og borgarstjóri samstundis, er ein spurningur, sum má svarast, um hann verður aktuellur.

Vísandi til omanfyristandandi, skal Heilsu- og innlendismálaráðið hervið boða frá, at hjálagda avgerð, dagfest 9. oktober 2018, um rættin hjá kommunustýrislimum at fáa mál á skrá, stendur við.

Vinaliga

**Turid Arge**
aðalstjóri

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo